Símun Eliasen, ÍF:

# - Hatta var óført

Fyrrverandi HB-leikarin, Símun Eliasen, sum nú er aftur í barndómsfelagnum ÍF, var sum verða man sera væl nøgdur við sigurin á havnarliðnum og harvið sessin í hálvfinaluni.

- Hatta var veldugt. Tað var umráðandi fyri okkum at skora tíðliga í dystinum. Aftaná málið taka vit tempoið úr dystinum, og so koyrir dysturin fyri tað mesta upp á okkara premissir, helt Símun eftir dystin.

- Tað hevði eisini alt at siga, at vit vóru klárir frá fyrsta bríksli, tí tað hevur verið ein vansi hjá okkum í ár, at vit ikki altíð hava verið klárir frá byrjan. Vit stóðu eisini væl á vøllinum frá byrjan. Teir hava bóltin nógv og leypa nógv á, men tað kanst tú altíð rokna við, tá ið tú spælir móti HB í Gundadali.

Dysturin var eisini serligur fyri Símun á tann hátt, at hetta var fyrsta vitjanin hjá honum í Gundadali móti HB, síðani hann skifti frá føroyameistarunum í vetur, og hann fekk eisini fitt av lógvabrestum úr HB-húsinum, tá ið stadionspeakarin kunngjørdi hansara navn undan dystinum.

- Tað var eitt sindur løgið undan dystinum, men tá ið dysturin var byrjaður, hugsaði eg ikki um tað, segði Símun Eliasen.

**tn**

HB-ÍF 0-1 (0-1):

# Eitt mál var nokk



*Hóast HB hevði leikligu yvirvágina, so tóktust fuglfirðingarnir vera munandi svangari eftir sigrinum, og tað varð í seinasta enda avgerandi*

Mynd: Jens Kristian Vang

**Sylla Ahmed legði ÍF á odda, longu tá ið minni enn tveir minuttir vóru leiktir av fjórðingsfinaluni millum HB og ÌF í Gundadali hósdagin, og tað var nóg mikið til, at verjani steypavinnararnir ruku út**

LØGMANSSTEYPIÐ

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir áskoðarar, ið høvdu leitað sær í Gundadal í góðveðrinum Kristi Himmalferðardag at hyggja at dystinum, fingu ikki nógvan valuta fyri pengarnar. Dysturin var illa leiktur við lítlum samanhangandi spæli og einari rúgvu av steðgum í dystinum.

### Eitt álop-eitt mál

Fuglfirðingar fingu eina dreymabyrjan upp á dystin. Stadionurið vísti 01:40, tá ið bólturin lá í meskunum í HB-málinum. Gunnar Nielsen hjá ÍF slapp framvið Janusi Joensen í høgru síðu og legði innfyri, har Magni á Lakjuni í tveimum atløgum vann ein nærdyst við Bárð í HB-málinum. Bólturin kom fyri føturnar á Sylla Ahmed, sum staddur áraka brotssparksblettin sendi mitt í málið, hóast tveir HB-leikarar royndu at verja fyri á sjálvari mástrikuni.

Hetta var ein veruligur hvøkkur fyri HB, sum tóktist hava ógvuliga ilt við at koma í gongd. Greipuvinnararnir frá í fjør hava ikki funnið stevið enn í ár, og álopsspælið hjá teimum var ógvuliga stirvið og óskipað. Tað er eisini ógvuliga undrunarvert, at Heine Fernandez hevði valt at seta Jákup á Borg at leika høgra bakk og flyta Hall Danielsen fram um á høgra miðvallarapláss, sum Jákup vanliga røkjur. Jákup er væl skjótari spælari enn Hallur, og tað var júst slíkum monnum, ið HB hevði tørv á móti ÍF-verjuni, sum ikki er av teimum skjótastu.

Hinvegin var nógv meiri bit í álopsspælinum hjá ÍF. Gamaní vóru fuglfirðingar ikki so ofta á vitjan framman fyri málinum hjá HB, men teirra álopsspæl tóktist meiri málsøkið og ágrýtnari. Ikki minst var tað ein fragd at síggja Sylla Ahmed, sum við sínum bóltførleika fleiri ferðir gav HB-verjuni grá hár í høvdið. Saman við Magna á Lakjuni man Sylla ivaleyst manna tekniskt dugnaligasta álopið í landinum.

### HB hevði sínar møguleikar

Tað var ikki óvæntað, at tað var HB, sum sat á tí mesta av dystinum. Teir fingu eisini ein gyltan møguleika at javna, tá ið fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Tór-Ingar Akselsen slapp inn um verjuna hjá fuglfirðingum og bleiv so rendur um koll av Bartal Eliasen og Pól Ennigarð. Dómarin, Georg Rasmussen, ivaðist ikki og dømdi brotsspark. Men brotssparkið sendi Tór-Ingar sjálvur væl upp um málið hjá Allani Joensen.

Í seinna hálvleiki var talan fyri tað mesta um eitt langt HB-álop, og heimaliðið hevði eitt hav av hornaspørkum, men teir opnu málmøguleikarnir vóru ikki nógvir í tali. Nakrir vóru tó, men tann størsta málmøguleikan eftir steðgin átti kanska ÍF, tá ið Sylla slapp leysur við Bárði, sum tó bjargaði væl. Annars var dysturin nógv merktur av, at ÍF royndi at trekkja tíðina út. Tað er eisini væl skiljandi, at teir gjørdu tað, tí teir vóru á odda. Hinvegin eigur dómarin at steðga slíkum, og tað var als ikki gjørt í Gundadali hósdagin. Gamaní hevði Georg Rasmussen fleiri ferðir at fuglfirðingum og bað teir skunda sær, men tá ið eitt lið blívur við, er neyðugt at taka ostaflísuna fram og ikki bara halda áfram við at geva munnligar ávaringar. Hetta við at drýggja sær tíðina, tá ið man er á odda, sum vit kenna best úr útlondum, sær út til at vinna fram í Føroyum, og tað var dysturin í Gundadali eitt sera gott dømi um. Vónandi fara dómararnir her á landi at sláa hart niður á hetta fyribrigdi, tí tað er ikki tað, sum áskoðararnir hava goldið pening fyri at síggja. ÍF vann dystin 1-0, og tað merkir, at teir skulu spæla hálvfinalu móti toftamonnum um sess í finaluni á Ólavsøku. Havandi í huga hvørji lið eru eftir í kappingini, eru fuglfirðingar kanska eisini tað besta boðið upp á ein komandi steypavinnara.

At teir vunnu dystin móti HB var kanska ikki heilt í tráð við spælbýti og málmøguleikar, men hinvegin tóktust fuglfirðingar verða nógv svangari eftir at vinna, enn hvat havnarmenninir vóru, og tí var tað kanska uppiborið, at ÍF nú er í hálvfinaluni.

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-ÍF 0-1(0-1)**
1-0: Sylla D. Ahmed 2.
**HB:** Bárður Johannesen - Jákup á Borg, Rasmus Nolsøe, Johannis Joensen, Janus Joensen - Hallur Danielsen(65. Heine Fernandez), Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, John Heri Dam(46. Rókur av Fløtum Jespersen) - Hans á Lag, Tór-Ingar Akselsen
**ÍF:** Allan Joensen - Eyðálvur Petersen, Bartal Eliasen, Pól Ennigarð, John Thomsen - Gunnar Nielsen(90. Áki Petersen), Símun Eliasen, Høgni Zachariassen, Rúni Elttør(70. Fritleif í Lambanum) - Sylla Ahmed, Magni á Lakjuni(86. Hanus Eliasen)
**Gul kort:** Johannis Joensen - Bartal Eliasen, Høgni Zachariassen og Rúni Elttør
**Dómari:** Georg Rasmussen

Janus Joensen, HB:

# - Vit kunnu takka okkum sjálvum

Sterki vinstri bakkurin hjá HB, Janus Joensen, var ógvuliga misnøgdur við avrikið hjá føroyameistarunum eftir ósigurin fyri fuglfirðingum hósdagin.

- Vit eru simpulten for slappir. Eg veit ikki, um vit kanska fara á vøllin og halda, at vit hava vunnið dystin frammanundan, men teir geva okkum ein hvøkk beinan vegin, og tað eigur at fáa okkum at vakna, segði Janus eftir dystin.

Janus, sum var ein av teimum frægu hjá HB, helt eftir dystin, at HB hevði ríkuligt av málmøguleikum bæði til at javna og at leggja seg á odda, men at teir vóru alt ov óneyvir framman fyri málinum hjá ÍF.

- Vit hava nokk av kjansum, men eru ikki nóg skarpir. Teir hava eisini okkurt kontraálop og eru nær við at koma upp á 2-0, segði Janus.

**tn**